Fótbóltsdøming:

Seks eygleiðarar settir

Dómarastøðið skal hækkast, m.a. tí at FSF skal melda tveir dómarar til FIFA

Tað hevur leingi verið eitt ynski, og við UEFA-limaskapinum er tað ikki vorðið minni aktuelt: dómarastøðið skal hækkast!

Ein mátin er at seta fólk at eygleiða dómararnar og so geva teimum ummæli og góð ráð eftir hvønn dyst. Eina slíka skipan fer FSF nú at seta í verk.

Fyrrverandi dómarar

Eftir tilmæli frá dómarafelagnum hevur FSF sett seks eygleiðarar: Hesir eru Martin á Mýruni, Jens Straagaard Holm, Sólbjørn Mortensen, Agnar Bech, Ole Christensen og Magnus Fuglø.

Hesir skulu á eitt eygleiðaraskeið 18. mars hjá dananum Finn Rye Wæde. Dagin fyri skal dómarafelagið hava aðalfund og taka endaliga støðu til málið.

FIFA-dómarar

Jens Erik Magnussen, FSF, sigur, at eingin ivi er um, at støðið er hækkað seinastu árini, men altjóða luttøka okkara m.a. hevur við sær, at vit skulu melda ein ella tveir dómarar til FIFA.

- Vónandi fer hetta at hava við sær, at dómararnir verða uppaftur meira ambitiøsir og at úrvalið verður størri, sigur Jens Erik Magnussen, sum vónar og væntar, at eygleiðaraskipan fer at hava stóran týdning fyri dómarastøðið.

øwh



Baldvin Baldvinsson. Eina okkara royndastu dómarum skal nú eygleiðast

Dómarar, - ikki trio

Burturspilt at lata egnaðar dómarar vera linjuverjar

Alt viðvíkjandi dómarum og døming í fótbólti skal umskipast komandi kappingarár. Hvørjar broytingarnar vera verður ikki heilt greitt fyrrenn fyrst í næsta mánaða. FSF fer seinni at seta eina nevnd, sum eisini fera at hava umboð úr dómarafelagnum, at leggja broytingarnar til rættis.

So mikið er greitt, at dómararnir skulu skiftast sundur eftir royndum og førleika, so teir eru antin 1., 2. ella 3. deildardómarar. Hetta er ikki nakað nýtt. Tað nýggja er, at sundurbýtið verður grundað á eygleiðarametingar heldur enn leysligum FSF- og dómarafelagsmetingum.

Nýtt verður eisini hetta, at dómararnir fara í ár ikki at vera partar av føstum tríeindum (trio'um). Jens Erik Magnussen, FSF, sigur, at í fleiri tríeindum eru tríggir, sum hava høvdu kunna dømt, og tí er tað oyðsl at lata teir vera linjudómarar.

- Í ár verður skipanin tann, at dómararnir verða útpeikaðir einsæris, og síðani verða linjudómararnir settir aftrat teimum, sigur Jens Erik Magnussen.

Hann leggur aftrat, at enn er ikki endaliga greitt, hvør skal seta linjuverjarnar: dómaranevnd FSF, dómarafelagið ella dómararnir sjálvir.

øwh

ÍTRÓTTUR

Fleiri skeið

Fleiri dómaraskeið verða í næstum. Egga Jensen og Hans Henrik Bøttger hava júst havt skeið í Klaksvík, og 10. mars og 21-23 mars standa teir fyri skeiðum í ávikavist Vági og Havn.

Hesi skeið eru opin fyri øllum, men høvi verður ikki at fara til royndkortini. Teir luttakarar, sum vilja hava prógvið sleppa upp til royndkortini 17. mars.

Tá vera teir báðir Preben Hald og Steen Pedersen frá DBU í Havn, har teir skulu hava skeið fyri royndum dómarum.

øwh

MF

Frá Maskinmeistarafelagnum

Aðalfundur

Aðalfundur Maskinmeistarafelagsins verður leygardagin 24.3.1990 kl. 14.00 á Hotel Hafnia.

Dagsskrá samb. lógini.

Møgulig uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin.

P.S. Minnist til at hava limakortið við.

Nevndin

sosialurin

KLINIKK FYRI FÓTTERAPI

- Fótviðgerð
- Ortonyxi
- Silicone
- Innlegg
- Diabetes viðgerðir
- Ráðgeving

STATSAUTORISERET FODTERAPEUT

Dagmar Aldrea Svabo
statsaut. fótterapeutur
Bringsnagøta 10
Tlf. 10727



Arnbjørn Sivertsen

Bridge

Nú er arbeiðið við at fáa eitt kvinnulandslið til NM-kappingina í summar upp á føtur komið nakað áleiðis. Roynt hevur verið at fáa so nógvar kvinnur sum gjørligt við til venjingar og kappingar, og einar 15-20 hava vist tiltakinum áhuga. Um vikuskiftið hittust so 14 kvinnur í Havnini og spældu nøkur spøl saman. Av hesum ætla tær 10 at halda fram við arbeiðnum, til funnið verður fram til, hvørjar seks skulu á tað fyrsta føroyska kvinnulandsliðið í bridge. Sum flestum kunnugt, verður NM-kappingin í bridge spæld í Havnini í døgunum frá 2.-8. juli í ár, og spennandi verður at siggja, hvussu tað fer at gangast teimum.

Her er eitt spæl, tær spældu um vikuskiftið:

N / E - V

	♠ A-K-10-9-7 ♡ Q-10-8-4 ◇ 8 ♣ 9-8-4	
♠ 8-4-2 ♡ K-5 ◇ 10-9-2 ♣ K-10-7-6-2	N V E S	♠ 6-5-3 ♡ J-6 ◇ K-Q-6-5-4-3 ♣ Q-3
	♠ Q-J ♡ A-9-7-3-2 ◇ A-J-7 ♣ A-J-5	

N	E	S	V
Súsanna	Danielsen	Súsanna	Dam
1 sp	pass	3 hj	pass
4 ut	pass	5 sp	pass
6 hj	pass	pass	pass

Útspæl: rú 10

Norður hevur bert 9 HP, men hon valdi so kortini at opna við kortunum. Majorlitirnir 5 - 4 og singleton í rútara økir nógv um virðið á hondini. Suður sprakk í 3 hj og visti eina sterka hond. 4 ut spurdi um ess, og 5 sp vístu 3 ess.

Útspælið, rú 10, var ikki tað hepnasta, Vestur kundi finna. Lat tað vera sagt, at eitt »passivt« útspæl er rættiliga vanligt móti slemmum, og tað einasta útspælið, sum kann seta kontraktina, kleyvari, er frá kongi fimta — avgjørt ikki eitt vanligt útspæl.

Suður tók við essinum, spældi hj A og lágan hjartara, og Vestur kom inn. Nú var ov seint at skifta til kleyvara — Suður tók við essinum, spældu sp Q og J trumfaði síðan ein rútara. Uppá sp A, K og 10 kastaði Suður báðar tapararnar í kleyvara og ein rútara. Tólv stingir og ein felagstopp.

Eitt annað part (Ásvør Djurhuus og Marita Mohr) meldaði og vann 6 hj. Hini N-S pørini spældu 4 hj og 5 hj. Avgerandi fyri, hvørt hesin litlislemmurin verður meldaður ella ikki, er um Norður opnar við sínum 9 HP. Um Norður fyrst meldar pass, Suður opnar 1 hj, og Norður síðan leypur í 4 hj, er tað ikki so eyðsæð hjá Suðri, at kontraktin kanska skal eita 6 hj. Hon hevur 17 HP, og makkarin hevur minni enn 12!

Komandi vikuskifti (leygardagin) verða nakrir spennandi dystir leiktir í Brúna skúla v/ Fr. Petersensgøtu í Havn. Talan er um semifinalurnar í steypakappingini. Dystirnir eru: Simin Hansen — Eyðun Jensen og Petur Reinert — Mortan Rasmussen. Teir verða leiktir seinnapartin, og um kvøldið verður finalan leikt millum tey vinnandi liðini.